Falkavegur 6, 2. hædd
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www. hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir deildarleiðara til fyribils setan

Við hesum verður lýst eftir avloysara fyri deildarleiðaran á matvørudeildini. Starvið verður sett 1 ár í senn upp til 3 ár.

Matvørudeildin er tann fyrisitingarliga deildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum umsitur matvørulógina og kunngerðir við heimild í henni.

Starvið er sera fakliga mennandi og skipanarliga avbjóðandi.

Í løtuni verða kunngerðir gjørdar og settar í verk, sum hava við okkara fiskiídnað at gera. Skipanir skulu byggjast upp við støði í kunngerðunum.

Vinnumálastýrið hevur eisini boðað frá, at nýggj matvørulóg skal gerast í komandi ári og verður hetta eisini ein av uppgávunum hjá fyribils setta deildarleiðaranum.

Dagliga arbeiðið er annars av skipanarligum slagi. Feltarbeiði og málsviðgerð skal skipast og samskipast soleiðis, at øll tey nógvu økini, matvørulógin fevnir um, verða røkt til lítar.

Á matvørudeildini arbeiða 10 fólk.

**Førleikakrøv**
Akademisk útbúgving innan náttúruvísund.

**Fyrimunir**
Tað er ein fyrimunur, um tú kennir til – og hevur royndir – við at arbeiða við matvørulógini og teimum fakøkjum, sum matvørulógin fevnir um.

Tú kemur í samband við nógv fólk og skal tí hava góð evnir at samskifta við vinnu og fólk í heila tikið. Harafturat skal tú hava góð organisatorisk evni.

**Setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið. Nærri upplýsingar um sáttmálaviðurskifti síggjast á heimasíðuni www.lnd.fo

**Umsókn**
Umsóknin saman við prógvum, CV og ummælum skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. oktober 2001. Avloysarastarvið ynskist sett skjótast til ber.

Upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra.

**veitst tú ikki tað?**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Býlingshúsið millum Gilja, at byrja 1. november 2001.

**Starvið**
Talan er um tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, at byrja ávíkavist 15. august og 1. september 2001.

**Stovnslýsing**
Um ikki pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin í avmarkaða tíð.
Á stovninum eru 52 børn, 2 barnagarðsstovur og ein vøggustova.
Talan er um eitt starv í Reiðrinum, sum er ein vøggustova við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og stutt er burtur í hagan og yvir undir Svartafoss.

**Vit ynskja**
At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kirstin Djurhuus, leiðara, tlf. 31 83 72 ella Katrin Petersen samskipara.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða Býlingshúsinum millum Gilja, box 3165,188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 22 .oktober 2001.

SNARSKIVAN

ADC-Heilsølan
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
ARBEIÐSHANDSKAR
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

V&B

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið

60°00' N og 006°30' W
62°00' N og 006°30' W
62°00' N og 003°00' W
60°00' N og 003°00' W

Felagið Multiwave Geophysical Company AS kannar øki
Kanningarnar verða gjørdar vegna InSeis AS

| | |
|---|---|
| Byrjað verður | 27.09.2001 |
| Arbeiðið tekur væntandi | 5 vikur |
| Skipanavn | Polar Princess |
| Kallibókst/Heimstaður | JXBV3, Norra |
| Fiskiveiðiumboð | Oddur Berg |

Samband fast við skipið á VHF rás 16

Upplýsingar um dagligar seismiskar fráboðanir og ávaringar fáast á sjálvvirkandi telefonskipanini 32 03 41, ella á telefon 31 10 65

# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Fuglafjarðar kirkjusókn **týsdagin 6. november 2001.** Valið fer fram í Fuglafjarðar kirkju og Bønhúsinum á Hellunum nevnda dag frá **kl. 10-12 og 16-18.**

Valevnislistarnir skulu vera formanninum fyri valstýrinum í hendi í seinasta lagi **9. oktober 2001 kl. 19.00.** Valevnini mega í mesta lagi vera 13, og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri vælrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 6. november 2001, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 7 limir.

Krossur verður settur annaðhvørt fyri listan ella fyri **einum** valevni á listanum.

Øll valevni skulu geva skrivliga váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, skulu tey undirskriva ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta á telefon 44 47 89, **8. og 9. oktober 2001, báðar dagar frá kl. 18-20.**

*Fuglafjørður hin 19. september 2001.*

**Valstýrið fyri Fuglafjarðar kirkjuráð**
Heini Beder, formaður

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo






KVASiR

## Teldukoyrikort-skeið ið byrja hendan mánaðin

European Computer Driving Licence

**02/10**
**Grundskeið í stýriforritinum Windows**
Týskvøld kl. 19.00 - 22.00
02/10 . 09/10 . 16/10

**08/10**
**Grundskeið í framløguforritinum MS PowerPoint**
Mánadag fyrrapart kl. 09.00 - 12.00
08/10 . 15/10

**Grundskeið í tekstviðgerð við MS Word**
Mánakvøld kl. 19.00 -22.00
08/10 . 15/10 . 22/10 . 29/10

**10/10**
**Grundskeið í tekstviðgerð við MS Word**
Mikukvøld kl. 19.00 - 22.00
10/10 . 17/10 . 24/10 . 31/10

**Grundleggjandi kunningartøkni**
Mikudag seinnapart kl. 13.30 - 16.30
10/10 . 17/10 . 24/10

**22/10**
**Grundskeið í rokniarki við MS Excel**
Mánadag fyrrapart kl. 09.00 - 12.00
22/10 . 29/10 . 05/11 . 12/11

**31/10**
**Grundskeið í stýriforritinum MS Windows**
Mikudag seinnapart kl. 13.30 - 16.30
31/10 . 07/11 . 14/11

**Kom og royn teg**
Teldukoyrikort-roynd er hvønn fríggjadag kl. 14.00 og 15.00.
Royndin er teldutøk og tekur 30 min.
Kostnaður kr. 200,-

**Góð grundskeið**
Tað er ikki neyðugt at tekna seg til eina heila teldukoyrikort-skeiðrøð.
Støku skeiðini geva sera gott innlit í evnið og leggja lunnar undir betri úrtøku.

SKEIÐSTOVAN
KVASiR
FARODANE
TLF 320204
http://kvasir.farodane.fo

**Sosialurin** Lesið Sosialin -tað loysir seg!

# Fimm starvsfólk

Kollafjord Pelagic pf. er nýtt uppsjóvarvirki, sum verður bygt í Kollafirði.
Endamál virkisins er at virka uppsjóvarfisk til matna.
Framleiðsluorkan er í byrjanini uml. 1.000 tons um samdøgrið, men verður økt til 1.400 tons frá aug. 2002.
Í fyrstani verður arbeitt í einum skifti, men hugsandi er, at farið verður til 2 skifti aftaná at innkoyringartíðin er farin.

Framleiðslan verður í høvuðsheitum úr makreli, svartkjafti og sild. Fiskurin verður støddarskildur og pakkaður eftir kundans ynski og frystur í plátufrystarum og frystitunnlum.
Framleiðslutólini eru á einum høgum tekniskum støði.
Ætlandi letur virkið upp fyrst í januar 2002.

**Til hetta krevst:**

**Framleiðsluleiðari**
ið kemur at uppbyggja og samskipa framleiðsluorkuna, við tilvísing til stjóran

- skal hava royndir innan økið
- má hava viðkomandi útbúgving
- má hava gott yvirlit
- fær ábyrgdina av at leggja til rættis og viðlíkahalda góðskustýringina

**Tekniskur leiðari**
- skal hava góða ástøðiliga útbúgving og royndir innan økið
- kemur at hava ábyrgdina av allari tekniskari útgerð
- skal vera við til at seta upp tekn-isku útgerðina
- verður við til at uppbyggja (seta fólk) á teknisku deildina

**Skrivstovufólk**
til vanligt skrivstovuarbeiði, herundir bókhald

- skal hava góðan kunnleika til teldur
- skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- má hava góð samstarvsevni og vera røkin og fyrikomandi

**Formaður/ -kvinna**
- skal við tilvísing til virkisleiðaran hava ábyrgdina av pørtum av framleiðsluni
- skal vera røkin
- skal hava góð samstarvsevni
- má vera før/-ur fyri at taka eitt tak, tá á stendur
- má duga væl at leggja til rættis

**Framleiðslusamskipari**
- skal skipa fyri, at edv-kervið, sum er knýtt at framleiðslustýringini, er virkið.
- skal duga væl at leggja til rættis framleiðsluna við hjálp av edv-kervinum, sum er skraddaraseymað til framleiðslustýringina – hetta saman við formanninum.

Umframt føroyskt, er ynskiligt at starvsfólkini duga norðurlendskt og enskt. Løn og setanartreytir eftir avtalu.
Nærri fæst at vita við at ringja til Janus Norðberg á tel 47 77 77 ell. 21 98 56.

Sendi umsóknina, áðrenn 12. okt. 2001, til: Kollafjord Pelagic pf. · Postboks 3190 · FO-110 Tórshavn · tel 47 77 77 · fax 47 77 78